Stuðlstiltak til frama fyri kappróðurin hjá KÍF

Leygardagin 28. mai kl. 14.00 í kappróðrarneystinum

Leygardagin 28. mai fara gentu- og dreingjamanningin á Kolli at rógva stuðulsrógving til frama fyri kappróðurin hjá KÍF. Eisini verður skipað fyri einum tiltakið í kappróðrarneystinum, sum hevur til endamáls at savna øll kappróðraráhugaði til eina hugnaliga og stuttliga løtu. Fleiri bátar verða á fjørðinum og møguleiki verður at síggja nakrar av teimum legendarisku manningunum, sum hava róð fyri KÍF upp gjøgnum árini.

Tiltakið byrjar kl. 14.00 við hesum á skránni:

- Øgiliga manningin, sum vann FM-heitið við Kollfirðingi í 1979, tekur nøkur tøk við Kollfirðingi
- Kempurnar, sum vunnu FM-heitið við Kolli síðst í 80-unum, manna Kollfirðing og taka nøkur tøk ímóti dreingjamanningini á Kolli. Legendurnar, sum vunnu FM-heitið við Kolli 1995, bjóða eisini av í Bismark.
- Falkurin og Greivin (gomul 6-mannafør) og dreingjamanningin á Kolli rógva kapp (ca. 3-400 m). Bismark og Kollfirðingur verða helst eisini við ☺
- Kvinnurnar sum róðu í ljósareyðum draktum við Kolli síðst í 80-unum, manna Kollfirðing og taka nøkur tøk ímóti gentumanningini umborð á Kolli.
- Kaffi, Køkur og bollar verður at fáa í neystinum

Møguleiki verður at stuðla gentu- og dreingjamanningini við teirra stuðulsrógving, har manningarnar, eftir tiltakið, fara at rógva ein tíma í part.

Nógv arbeiði stendur fyri framman um kappróðurin í Kollafirði skal byggjast upp til at blíva ein sterkur partur av KÍF. Neystið treingir til átrokandi ábøtur, somuleiðis sum arbeiði má leggjast í at fáa venjingarhølið og vesiviðurskiftini uppá pláss í kappróðrarneystinum. Allur stuðul er tí kærkomin

KÍF takkar fyri stuðulin!

VEND ☺

Stuðulsrógving til frama fyri kappróðurin hjá KÍF

Hvat er stuðilsrógving?

Gentu- og dreingjamanningin á Kolli fara 28. mai 2016 at rógva so langt sum tey klára í ein tíma per manning.

Hvørjum stuðli eg?

Stuðulin skal brúkast til at betra um umstøðurnar hjá kappróðrinum hjá KÍF og gera kappróðrarneystið í betri stand.

Hvussu stuðli eg?

Tann ið stuðlar, játtar seg at gjalda eitt krónutal fyri hvønn kilometur sum gentumanningin og dreingjamanningin tilsamans rógva í ein tíma per manning.

Hvussu nógv komi eg at gjalda?

Um eg nú játti at gjalda 10 kr fyri hvønn kilometur, hvussu nógv komi eg so at gjalda? Siga vit at báðar manningarnar koma at rógva 15 km tilsamans, so verður upphæddin 10 x 15 = 150 krónur. Ein kann eisini velja at stuðla við eini fastari upphædd.

Lutaseðil: 3 eskjur av rækjum verða burturlutaðar ímillum tey sum stuðla

---

Undirritaði bindur seg at lata _____ kr fyri hvønn km, ið gentu- og dreingjamanningin á Kolli tilsamans klára at rógva í ein tíma per manning.

Ella kr.: _____

Navn: _____ Bústaður:_____

Peningurin verður at flyta av konto: _____í_____

Peningurin verður at flyta á konto hjá KÍF: 9181 – 497.207.6

Dagfest: _____/_____ 2016 Undirritaði: _____

KÍF takkar fyri stuðulin!

VEND ☺